# matas



## Lærlingur og avloysari

Ert tú tann rætta/ rætti til okkara handil?

Til handil okkara í SMS sóknast vit eftir einum lærlingi og einum avloysara til barnsburðarfarloyvi at byrja 5. mai.

**Vit bjóða**
Í lærutíðini fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving/arbeiðsgongd innan handil, vakurleikarøkt og heilsu.

Í Matas starvast 6 fólk og sum lærlingur/ avloysari, fært tú innlit í alskyns viðurskifti viðvíkjandi kundarøkt, sølu og innkeypi.

**Førleikakrøv**
Tað er eitt krav at lærlingurin hevur FHS-útbúgving, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og annars ert fyrikomandi og røkin.

Meira fæst at vita um starvið á tel 314888.

**Umsókn**
Skrivliga umsóknin, ið saman við próvskjølum, skal vera okkum í hendi innan 4. apríl, kann sendast til:

**Matas**
Húsagøta · SMS · 100 Tórshavn
Att: Esther

SENDISTOVAN

Tel 31 48 88



# KOM Á HÁSKÚLA

Stuðulstænastan

## Háskúlaskeið fyri fólki við sálarligum órógvi

Í døgunum **13. til 16. apríl 2008** skipar Stuðulstænastan saman við Føroya Fólkaháskúla fyri tí væl umtókta háskúlauppihaldinum fyri persónum við sálarligum órógvi.

Ætlanin við háskúlauppihaldinum er at geva teimum luttakandi betri lívskvalitet, har møguleiki verður fyri at royna seg í ymiskum viðurskiftum undir vardum og tryggum umstøðum.

Kunnandi fundur í samband við háskúlauppihaldið verður í Løkjukafeini, Løkjatún 1 á Argjum, **týsdagin 1. apríl 2008 kl.19.00.**

Tey, ið ætla at luttaka á skeiðinum, verða biðin um venda sær til Løkjukafeina á tlf. 554030.

**Stuðulstænastan**
**og Føroya Fólkaháskúli**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 36 00 00, Faks 36 00 01, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo



almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

*Umsóknarfreist er týsdagin 1. apríl 2008. Vinarliga merkið brævbjálvan: " Sosialráðgevar til Økisdeild í Havn"*

## Hevur tú hug til
# SOSIALT ARBEIÐI



### Almannastovan søkir eftir ráðgevum til Økisdeildina í Havn og í Klaksvík.

Uppgávurnar hjá Almannastovuni eru, við grundarlagi í sosiallóggávuni, at veita persónliga sosiala ráðgeving og vegleiðing, og alment og persónligt at upplýsa um rættindi og skyldur.

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá Almannastovuni er at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur viðvíkjandi almannaspurningum, at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni og fíggjarligar veitingar. Hartil skal Almannastovan fáa til vega og greina hagtøl til politiska myndugleikan.

**Førleikakrøv**
Ert tú sosialráðgevi, námsfrøðingur, samfelagsfrøðingur, ella hevur aðra sosiala ella samfelagsliga útbúgving, og hevur tú hug til sosialt arbeiði og vilt vera við til at gera ein mun, so er tað tær vit vilja hava fatur á. Royndir í líknandi arbeiði kunnu vera ein fyrimunur.

**Starvið**
Sum starvsfólk á Almannastovuni hevur tú ein týðandi leiklut yvirfyri borgarum, tá tað snýr seg um at skapa fíggjarliga og sosiala trygd, at fyribyrgja sosialum trupulleikum og at hjálpa, tá ið trupulleikar koma í.

Vit kunnu bjóða eitt starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum, har møguleiki er fyri persónligari og fakligari menning.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarbólki 6, ella avvarðandi yrkisfelag, um tað fevnir um sáttmálaøkið hjá Almannastovuni.

**Nærri upplýsingar**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Rúna Rasmussen, deildarleiðara, á telefon 35 35 70, ella Jóan Hendrik S. Samuelsen, deildarleiðara í Klaksvík, á telefon 45 72 40.

**Umsókn við avriti av prógvum, CV, v.m. skulu sendast til**
Almannastovuna,
Smyrilsveg 20, Postboks 3096,
110 Tórshavn.

KREA



# Páskastevna

## í Meinigheitshúsinum í Havn
## - í døgunum 21. til 24. mars 2008



| | | |
|---|---|---|
| **Langa fríggjadag:** | kl. 18.00 | Møti - Talari: Hanus Simonsen<br>Sangur: Kristiliga Sangkórið |
| **Leygardag:** | kl. 18.00 | Møti - Talari: Alfred Olsen<br>Sangur: Jóhan Magnus K. Olsen<br>Innsavnan til húsið |
| **Páskadag:** | kl. 18.00 | Møti - Talari: Reimund Langgaard<br>Sangur: Kórið í Meinigheitshúsinum |
| | kl. 22.00 | Ungdómstiltak |
| **2. Páskadag:** | kl. 18.00 | Møti - Talari: Alfred Petersen<br>Sangur: Erla og Hanna |
| | kl. 20.30 | Eftirmøti |

Páskastova "tær fyrstu páskirnar" er á loftinum.

Bønarløta er hvørt kvøld ein hálvan tíma áðrenn møtið byrjar.
Bjóðað verður til samtalu og forbøn. Barnaansing er undir møtunum.
Tulkað verður til enskt. Drekka er hvørt kvøld eftir møtið.



**Øll eru hjartaliga vælkomin**
***"Tað er fullgjørt!" Johs. 19,30***